## Bingjur av dollarum

Meksikanskir og komumbiskir løgreglumenn hava í samstarvi við amerikonsku løgregluna funnið 41 milliónir amerikanskar dollarar í reiðum peningi. Teir nógvu seðlarnir lógu fjaldir í nøkrum vørubingjum, sum vóru á veg til Kolumbia. Um miðjan mánaðin kom løgreglan fram á ta fyrstu bingjuna, og hinar vórðu funnar teir næstu tíggju dagarnar, skrivar AP. Myndugleikarnir í teimum trimum londunum ivast ikki í, at pengarnir vóru gjald fyri kokain, sum rúsevnaharkalið í Kolumbia hava sent til Meksiko og USA.



## Fleiri liva við bróstkrabba

Tøl hjá danska heilsustýrinum vísa, at altsamt færri kvinnur frá lívmóðurhálskrabba. Tilburðirnir eru fækkaðir heilt nógv síðani tíðliga í nítiárunum, og tað er kanningartilboðnum fyri at takka, sigur heilsustýrið. Bróstkrabbi er tann mest vanliga krabbasjúkan hjá kvinnum, men hagtølini fyri árini frá 2000 til 2007 vísa, at altsamt fleiri kvinnur liva við sjúkuni. Umframt bróstkrabba og lívmóðurhálskrabba er krabbamein í sjálvari lívmóðurini ein rættiliga vanlig sjúka hjá donskum kvinnum, sigur heilsustýrið.




# 767 milliónir í

**Næsta ár verður hallið á fíggjarlógini 767 milliónir og tað er áleið tað sama sum í ár**

FÍGGJARLÓGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað stóra takið hevur verið at tálma hallinum á fíggjarlógini, uttan at økja umarbeiðsloysið.

Tað staðfesti Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, tá ið hann beint fyri døgverða í dag almannakunngjørdi uppskotið til fíggjarlóg fyri í ár.

Hann staðfesti, at næsta ár verður hallið á fíggjarlógini 767 milliónir krónur og tað er tað sama, sum hallið verður í ár, tá ið avtornar.

### Útreiðslur í stað

Hann staðfesti, at hetta er eitt ótrúliga stórt tal. Hinvegin legði hann dent á, at sjálvur raksturin er bara vaksin 0,3% og tá ið lønarhækkingin upp 3% á almenna arbeiðsmarknaðinum roknaður upp í.

Og hann helt, at tað mann vera langt síðani at so lítil hækking hevur verið.

Inntøkurnar eru mettar til góðar 3,9 milliardir í inntøku. Av teimum er sløk 1,7 milliard í inntøku av skatti, inntøkan av avgjøldum er slakar 1,6 milliard og danska ríkisveitingin er 635, tá ið alt er talt við.

Útreiðslurnar eru slakar 4,7 milliardir og harav vera útreiðslurnar til rakstur slakar 4,3 milliardir og 317 milliónir eru settar av til íløgur.

### Inntøkurnar minka

Tá ið hallið er so stórt, hóast raksturin stendur í stað, er tað tí, at inntøkurnar hjá landskassanum eru nógv lækkaðar.

- Bara frá 2008 til í dag eru inntøkurnar minkaðar 220 milliónir og tað eru serliga inntøkurnar av mvg og avgjøldum, sum eru lækkaðar.